# Hans og Greta

Stutt vegleiðing um, hvussu spælt verður.

**Eitt stuttligt spæl, sum krevur at tað eru so nógvir luttakarir, at tað í minsta lagi er nokk til at gera ein lítlan ring.**

Tveir luttakarar verða valdir at vera Hans og Greta. Hesi báðir fáa bundið hvør sítt turriklæði fyri eyguni.

Restin av luttakarunum leiðast og gera ein ring. Hans og Greta skulu vera inni í ringinum.

Hans rópar síðani "Greta" og Greta svarar "Hans". Hans skal so royna at lurta og fara eftir ljóðinum og fanga Gretu, meðan Greta hinvegin lurtar eftir ljóðinum og roynir at fara undan Hansi, so hon ikki verður fangað.

Spælið endar tá Hans hevur fangað Gretu. Síðan kunnu tvey onnur veljast at vera Hans og Greta og spælið heldur so áfram.



GIGNI
Heilsufrøði til børn & ung

Niels Finsensgøta 37 · Postboks 132 · 110 Tórshavn · Tlf:562 300 · www.gigni.fo